# Oddabrak í Vestmanna

**Vinnur VÍF heimadystin ímóti Neistanum, eru helst bert tveir FM-biðlar eftir, men so má StÍF eisini koma ígongd, nú Tjaldur kemur á vitjan**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Nú fyrsti triðingurin av endaspælinum er um at fara aftur um bak, tykist VÍF vara liðið, sum hevur hug at draga frá hinum á stigatalvuni.

Ein av orsøkunum til, at hetta er so, er, at bæði StÍF og Neistin hava havt sera ilt við at finna aftur á sama spælið, sum setti tey somikið ovarliga í grundspælinum.

### Sannleikans tími

Men nú er um at verða seinasti møguleiki hjá hesum báðum. Strandingar hava hesaferð ein á pappírinum lættan dyst, tá Tjaldur kemur á vitjan, men skal talan gerast um tvey stig, so verður neyðugt, at StÍF tekur annað skinn um bak.

Hóast teir enn ikki hava tapt í endaspælinum, so hevur talan verið um tveir javnleikir í trimum dystum, og stigamissir av slíkum slag eru ráðini ikki til longur. Og so skal heldur ikki gloymast, at Tjaldur til tíðir kann spæla seg til tey mest ótrúligu úrslitini. Í grundspælinum vunnu teir eitt nú útidystin ímóti júst StÍF, og higartil í endaspælinum hava teir tikið stig frá Neistanum, umframt at VÍF slapp við skrekkinum, tá teir vitjaðu seinasta vikuskiftið.

### Brak í Vestmanna

Um sama mundi tekur VÍF ímóti Neistanum í Vestmanna. Ein dystur, sum framman undan líkist einum braki, har Neistin kann koma í ta støðu, at teir longu nú eru úti úr FM-stríðnum. Í øllum førum fyribils.

Tó at bæði liðini hava staðið seg javnt væl hetta kappingarárið, so hevur tað samstundis verið so, at VÍF væl og virðiliga hevur havt yvirvágina í innanhýsis uppgerðunum, so sálarliga er lítið at ivast í, at tað er VÍF, sum hevur yvirvágina. Verður sæð burtur frá tpera sigrinum í Runavík herfyri, so er VÍF eisini liðið, sum hevur sýnt betra spælið í endaspælinum, og tí mugu vestmenningarnir finna seg í leiklutinum sum favorittar. Ein leiklutur, sum tó ikki merkir, at teir sleppa undan at stríðast sunnudagin.

Seinasti dysturin verður í Havn, har Kyndil tekur ímóti KÍF. Hvørki av hesum liðum hevur verið partur av heiðursmerkjastríðnum í ár, men laga hini úrslitini seg væl, so kann væl vera, at vinnarin í hesi uppgerðini er heilt nær heiðursmerkjunum. Sum steypavinnari má Kyndil helst roknast sum favorittur hesaferð, men kollfirðingar hava áhaldandi víst tenn hetta kappingarárið, og hava teir ein góðan dag, so kann alt henda.

# Endabresturin

**FM-stríðið í talvi fyri lið verður avgjørt leygardagin, tá seiansta umfarið í liðkappingini stendur á skránni**

TALV
*Jákup Mørk*

Seinasta og avgerandi umfarið í liðkappingini í talvi verður leikt leygardagin kl. 14.00 í Kommunuskúlahøllini í Havn.

Serstakliga er spenningurin stóru í fyrstu deild, har ikki færri enn fýra feløg hava møguleika at taka gullið. Havnarmenn liggja best fyri av hesum, men kollfirðingar, toftamenn og klaksvíkingar eru bert eitt stig aftanfyri, so har kann alt henda. Ikki minst tí kollfirðingar hava tann á pappírinum lættasta dystin, sum er móti Vestmanna. Toftamenn skulu takast við teir úr sundalagnum, og endaliga skulu klaksvíkingar og havnarmenn dystast.

Í 2. deild er spenningurin ikki heilt so stóru. Sandavágur hevur vunnið deildina, og verða tað tí teir, sum koma í fyrstu deild fyri Vestmanna, og triðja lið hjá Havnini flytur niður í triðju deild. Í triðju deild verður tað ein dystur millum Gøtu og Kollafjørð, sum ger av, hvat lið flytur upp.
Støðurnar í einstøku deildunum framganga av yvirlitinum niðanfyri:

**1. deild**

| nr | lið | stig | dystar stig |
|---|---|---|---|
| 1 | HT | 20,5 | 10 |
| 2 | KTF | 19,5 | 11 |
| 3 | TT | 19,5 | 10 |
| 4 | KT | 19,5 | 9 |
| 5 | TFS | 18,0 | 10 |
| 6 | VT | 11,0 | 4 |

**2. deild**

Dystir

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | ST | 26,0 | 15 |
| 2 | RT | 21,0 | 13 |
| 3 | KTF2 | 19,0 | 12 |
| 4 | HT2 | 15,5 | 7 |
| 5 | VT | 15,5 | 5 |
| 6 | HT3 | 11,0 | 2 |

**Unglingar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | VT | 25,5 | 15 |
| 2 | GTb | 17,5 | 8 |
| 3 | GTa | 17,0 | 8 |
| 4 | KTFa | 16,0 | 9 |
| 5 | HT | 16,0 | 8 |
| 6 | KTFb | 15,0 | 6 |

# Innanhýsis kappingar hjá Havnar Fimleikafelag

**Sunnudagin 2. februar var høllin á Stórheyggi karmur um TVÆR amboðskappingar fyri gentur og dreingir 8 ár og eldri. 60 gentur og 45 dreingir luttóku til kappingarnar. Kappast var við venjingum á gólvi, á Reuther bana og í lopi við springbretti**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Hetta er 3. árið á rað at Havnar Fimleikafelag hevur skipað fyri innanhýsis amboðskappingum, og er luttøkan voksin fyri hvørt árið. Íalt 105 børn, kappaðust sunnudagin um at gerast nr. 1, 2 ella 3 á lopi ella venjingini á gólvinum.

Fimleikarin kundi, í samráð við venjaran, velja millum fýra bólkar, alt eftir tórleika. Til hvørja kapping vóru fýra dómarar, ið mettu um hvør var bestur. Vinnararnir fingu heiðursmerkir og allir luttakararnir fingu skreytblað fyri luttøku í kappingini.

Stuttligt var at síggja hvussu spent børnini vóru, og tað var eisini sera stuttligt at síggja hvussu børnini sum luttóku í fjør, høvdu tikið seg fram til í ár. Og so tey, ið fyrstu ferð vóru til kapping og skuldu yvirvinna á øllum tí nýggja, sum tað er at standa í eini stórari høll og skula einsamallur út á gólvið at gera fimleik. Her er nógv, ið skal yvirvinnast, men stuttligt er at síggja tey, tá ið tey eru liðug, tað er sum um einki er óyvurkomuligt.

Hjá mongum av fimleikarunum var hetta fyrstu ferð tey fingu heiðursmerki, so tey vóru rættuliga errin.

Tað vóru fitt av áskoðarum, mest foreldur og lótu hesi væl at kappingunum. Greiddu millum annað frá at tey merktu øktan áhugað fyri fimleiki hjá børnum teirra. Kappingarnar gingu væl, hóast kappingin hjá gentunum var nakað drúgv, og kappingin hjá dreingunum var nakað seinkað av hesum.

Vit hava deilvíst eftirmett kappingina og ætla at gera ymiskar broytingar til í næsta ár, men hetta frætta vit um seinni. Eingin ivi er um at kappingarnar eru komnar fyri at verða.

Til seinast ynskir felagið at takka øllum sum á ein hvønn hátt hjálptu, til kappingarnar.

## Úrslit í kappingini hjá Havnar Fimleikafelag

**Gólv**

Bólkur 1
1 Fríði Atlason 6,750
2 Tróndur Jensson 6,700
3 Christian Sørensen 6,550

Bólkur 2
1 Egil á Heygum Kass 7,450
2 Jørgin Bech Árting 7,375
3 Kristian B. Krosstein 7,300

Bólkur 3
1 Fróði Mortensen 8,550
2 Búi Persson Dalsgarð 8,100
3 Tóri Debes 8,000

Bólkur 4
1 Knút M. Gray Jarnskor 9,650
2 William Holm Jacobsen 9,600
3 Øssur Debes Eiriksfoss 9,525

**Lop**

Bólkur 1
1 Høgni Joensen 6,225
2 Bogi Berg 6,175
3 Dánjal Petur Nielsen 6,125

Bólkur 2
1 eingin luttakari
2
3

Bólkur 3
1 Fróði Mortensen 8,100
2 Búi Persson Dalsgarð 7,925
3 Tóri Debes 7,700

Bólkur 4
1 Knút M. Gray Jarnskor 9,400
2 Øssur Debes Eiriksfoss 9,350
3 William Holm Jacobsen 9,300






Vegna økt virksemi, søkir Hotel Føroyar eftir barrvørðum (m/k) til Kobarbarrina og Lobbybarrina at byrja skjótast tilber.

**Starvið**
Talan er um eitt sjálvstøðugt starv við tilvísing til yvirtænaran. Starvið umfatar ma.:

- Eina professionella kundatænastu
- Skeinkjan av sterkum drykkjum
- Skipa virksemi í barrunum
- Aðrar viðkomandi uppgávur

**Umsøkjarin**
- Er álítandi og fyrikomandi
- Er smílandi og løtt/lættur av lyndi
- Hevur góð samstarvsevni
- Kann veit eina góða og skjóta tænastu

**Vit bjóða**
- Eitt sjálvstøðugt og spennandi starv
- Eitt dynamiskt arbeiðspláss
- Gott samanhald

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til yvirtænararnar Tummas Láadal ella Petur Hentze á 317500.

Umsóknir skulu sendast til:

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 10. mars 2003

petur & petur • 320870

Hotel Føroyar ★★★★

*Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*




Vegna økt virksemi, søkir Hotel Føroyar eftir fólki til móttøkuna at byrja 1. mei 2003.

**Starvið**
Talan er um eitt sjálvstøðugt starv við tilvísing til móttøkuleiðaran. Starvið umfatar ma.: Eina professionella kundatænastu, inn- og útskriving av gestum, telefonavgreiðsla, bíleggingar, søla av kioskvørum og aðrar viðkomandi uppgávur.

**Umsøkjarin**
- Er smílandi og fyrikomandi
- Hevur góð samstarvsevni
- Hevur kunnleika til enskt og KT

**Vit bjóða**
- Eitt sjálvstøðugt og spennandi starv
- Avbjóðingar á altjóða støði
- Eitt dynamiskt arbeiðspláss
- Gott samanhald

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Unn Hilduberg, móttøkuleiðari á 317500.

Umsóknir skulu sendast til:

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 10. mars 2003

petur & petur • 320870

Hotel Føroyar ★★★★

*Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*



Elding hevur ljóðførini júst til tín tørv

**Send teldupost á: tonleik-elding@post.olivant.fo og ver við í lutakastinum um gávukort á kr. 1.000,-**

*Ein betri loysn!*
ELDING
SMS – Tel. 319697 • Saltangará – Tel. 449697 • Klaksvík – Tel. 479697

BILSKROKK



***Lakering & Plátuverkstaður***
**v/Brynleif Askildsen**

Vit hjálpa fólki við bilskaðum, ið umfata millum annað, lakering, tryggingarskaðar, buglur, rust og mangt annað.

Ring til okkara og fá eitt gott tilboð.

Tlf. 32 24 71 • 21 24 71
Slættanesgøta 9 • boks 2227 • FO-110 Tórshavn